**STARVSMANNAFELAGIÐ**

**OG**

**FØROYA KOMMUNALA ARBEIÐSGEVARAFELAG**
**OG**
**KOMMUNALA ARBEIÐSGEVARAFELAGIÐ**

Partarnir eru samdir um, at sáttmálin og semjan frá 8. apríl 2001 millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið er galdandi millum partarnar, við niðanfyri standandi ískoytum.

1. Notat til § 1, stk. 2 verður gjørt fyri kommunur, sum hava sáttmála við onnur fakfeløg um somu økir.

2. § 26 Stovnsleiðarar
Hesir leiðarar hjá Tórshavnar Kommunu eru undantiknir arbeiðssteðgi:

a. Leiðarin fyri sosialu deild
b. Leiðarin fyri mentamáladeildini
c. Leiðarin fyri býarbókasavnið
d. Leiðarin fyri snarskivuni
e. Leiðarin fyri KT -deildini
f. Leiðarin fyri brandstøðini
g. Leiðarin fyri Tórshavnar Havn
h. Leiðarin fyri svimjihøllini
i. Leiðarin fyri verkstaðið

3. Starvsmetingarnevndin
Partarnir eru samdir um, at seta eina starvsmetingarnevnd, við tveimum umboðum fyri hvønn partin.

Mál um innplaseringar, sum skulu viðgerast, verða fyrst viðgjørd í starvsmeting-arnevndini, sum er sett millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, sum hevur úttalilsisrætt. Síðani verður málið viðgjørt í starvsmetingarnevndini, sum er sett eftir hesum sáttmála, sum er millum Starvsmannafelagið og Kommunalu Arbeiðsgevara-feløgini.

4. Havnaumsjónarmenn
Partarnir eru samdir um, at verandi skipan, har eyka frídagar verða latnir ístaðin fyri vaktargjøld, heldur fram.

5. Klinikkassistentar og tannrøktarar
Partarnir eru samdir um, at klinikkassistentar, sum arbeiða fulla tíð, fáa løn í 12 mánaðir árliga.

6. Sløkkiliðsmenn
Partarnir eru samdir um, at sløkkiliðsmenn fáa vaktargjald sum er 6% av mánaðarlønini eftir lønarflokki 3,4 (stig 10)

7. Dagrøktarar

Dagrøktararnir fáa 3 frídagar árliga frá 1. januar 2002. Hesir frídagar verða lagdir í samráð millum leiðsluna fyri dagrøktarskipanina og umboð fyri dagrøktararnar soleiðis, at allir dagrøktarnir halda frí somu dagar. Frídagarnir kunnu liggja saman, kunnu býtast í tvey tíðarskeið, t.v.s. 2 saman og ein stakur, ella sum 3 stakir dagar.

Partarnir eru samdir um, at dagrøktarar koma inn í sáttmálan við niðanfyri standandi undantøkum:

a. §§2, 3 stk. 8,5,6,8 stk. 3,9 stk. 2 – 4, 11, 21 – 59.
b. § 12 viðv. arbeiðstíð. Arbeiðstíðin er frá kl. 7.30 – 17.15, tó kann einki einstakt barn verða í dagrøktini í longri enn 9 tímar dagliga.
c. § 19 Eftirløn. Eftirlønin verður bert goldin av tí skattskylduga partinum.
d. § 20. Her eru serlig viðurskifti galdandi tá dagrøktarar koyra við dagrøktarbørnum.
e. Arbeiðsdagatalið er sett til 21,75 dagar pr. mánaða.
f. Gjaldið pr. barn verður ásett soleiðis, at børn yngri enn 3 ár telja 25% av mánaðarlønini, og børn eldri enn 3 ár telja við 20%. Kommunurnar og dagrøktararnir í kommununum kunnu gera avtalur um eitt felagsgjald (meðalgjald), fyri øll børn.

8. Protokollat viðvíkjandi Dagrøktini.

9. Hjálagt semjuni er skjal, sum vísir innplaseringarnar.

10. Starvsmetingarnevndin millum Starvsmannafelagið og kommunalu arbeiðsgevarafeløgini samanskrivar endaliga samanskrivaða sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið við teimum ískoytum, sum eru í hesi semju.

11. Sáttmálin er galdandi frá 1. mars 2001 til 1. oktober 2003.

Tórshavn hin 2. november 2001

| | |
|---|---|
| Starvsmannafelagið | Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag |
| | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið |